93 ára gamli, Richard Jacobsen:

# – Tað var so deiligt at flúgva

**Tað er ongantíð ov seint at uppliva nakað. Hetta er túrurin hjá Richardi Jacobsen til Danmarkar eitt prógv um. Sum 93 ára gamal er hann fyrstu ferð farin út um landoddarnar, og fyri fyrstu ferð í lívinum hevur hann sitið í einum toki**



*Her er Richard Jacobsen komin til Keypmannahavnar. – Alt hevur gingið væl, sigur 93 ára gamli nólsoyingurin. Mynd: Símun A. Hansen*

ÚTFERÐARHUGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Mær dámdi ógvuliga væl at flúgva. Hetta var ein frálíkur túrur, og eg bleiv væl uppvartaður av fryntligu starvsfólkunum í flogfarinum, sigur 93 ára gamli, Richard Jacobsen.

Sosialurin hevði sent fólk at taka ímóti bóndanum í Kongsstovu í Nólsoy, tá ið hann kom til Keypmannahavnar.

- Eg sat so væl í flogfarinum, og eg føldi meg so væl. Tað var ógvuliga behagiligt, og tað var ein serstøk kensla at sita í einum flogfari yvir skýggjunum og so høgt uppi yvir landjørðini.

### Fyrstu ferð

Hóast Richard er 93 ára gamalur, er hetta fyrstu ferð, at hann er farin út um landoddarnar. Herfyri var hann í Havn og fekk sær pass, sum er fyrsta passið, hann nakrantíð hevur átt. Richard valdi sær eitt ES-pass.

Sosialurin tosaði við Richard stutt fyri middag í gjár, tá ið hann gott og væl var komin uppá pláss í Slagelse, har hann fer at halda jól saman við bygdarmanninum, Rúna, sum var við á ferðini niður.

Tað var Rúni, sum saman við bróðrinum, Bárði, hevur hjálpt Richardi í Kongsstovu á garðinum í mong ár, sum bjóðaði tí 93 ára gamla niður at halda jól saman við honum, konuni og børnunum.

Heidi, sum er konan, lesur í Danmark, meðan Rúni og bróðurin hava bát og rógva út í Nólsoy.

### Alt gekk væl

Richard sigur, at alt hevur gingið væl á ferðini úr Føroyum til Slagelse – og fyri fyrstu ferð í lívinum slapp hann eisini at koyra í toki.

- Vit koyrdi í toki úr Keypmannahavn til Slagelse. Hetta tók umleið ein tíma, og mær dámdi væl at koyra í tokinum.

Richard sigur, at tað er friðarligt í Slagelse, har tey verða um jólini.

- Her hoyrist einki, og her er gott at vera, sigur hann.

Spurdur, hvat tey annars fara at gera, nú hann fyri fyrstu ferð er uttanlands, sigur hann, at ætlanin er at fara ein túr til Keypmannahavnar at síggja seg um.

- Hetta verður eitt upplivilsi, og eg eri fegin um, at eg tók av og fór hesa ferðina, sigur bóndin í Kongsstovu í Nólsoy, sum kemur heimaftur úr Danmark við flogfari, 3. januar.



*- Eg sat so væl í flogfarinum, og eg føldi meg so væl. Hetta var ógvuliga behagiligt, og tað var ein serstøk kensla at sita í einum flogfari yvir skýggjunum, sigur Richard Jacobsen*

*Mynd: Símun A. Hansen*

# Jólaskip vitjar í Runavíkar kommunu

JÓLAHUGNI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Týsdagin 21. desember – í dag – fáa børn í Runavíkar kommunu vitjan av jólaskipi.

Skipið leggur at klokkan 18 í bátahylinum í Heiðunum við gamla handilin hjá Olivari, har tiltakið "Gomul Jól í Heiðunum" er.

Jólamaðurin og fleiri av hansara hjálparfólkum eru við umborð á jólaskipinum. Tey eru í jólahýri og hava óivað okkurt gott við til børnini. Møguliga verður eitthvørt spennandi at síggja eisini.

### Gomul jól…

Tiltakið, "Gomul Jól í Heiðunum", verður eisini í kvøld, og øll eru hjartaliga vælkomin at vitja inn á gólvið í Gamla Handlinum hjá Olivari, har Orkis hevur jólasølu og á Gamla neystaloftinum, har skótarnir hava hugnaliga kafé.

Fólk kunnu eisini keypa sær eitt jólatræ heim við frá skótunum. Jólatrøini verða seld uttanfyri neystið.



*Í kvøld klokkan 18 kemur jólaskip á Runavík – við jólamanni og fleiri hjálparfólkum*

### Jólavikan…

Handlarnir, sum eru í Handilsmiðdeplinum í Runavíkar kommunu, hava opið til kl. 20.00 hvørt kvøld til jóla og til kl. 22.00 lítla jólaaftan.

- Øll eru hjartaliga vælkomin at vitja okkum í Runavíkar kommunu, siga tey á Kunningarstovuni í Saltangará.